# Huldan

Rakul Jónleifsdóttir á Steig

Miðnám á Kambsdali 2023

Tey siga ofta, at vit eru ónd. Menniskjuni. At vit eru tey skitnu avkomini hjá Ádami og Evu, at vit eru teir tjóvar, ið stjala teirra mat og lokka teirra børn. Og sjálvandi gera tey tað, hvørji foreldur høvdu ikki hatað tann, ið stjól teirra barn? Men tey skilja ikki hví. Hví vit stjala. Hvat vit síggja. Høvdu tey bara vitað.

Tað var tíðliga á morgni, fyrstu ferð eg sá hana. Ein ung genta. Hon hevði flættað brúnt hár og grøn eygu. Eg hevði altíð øvundað menniskjunum fyri teirra litføgru eygu, ikki sum okkara náttarsvørtu. Gentan gekk og heintaði blómur, meðan hon sang. Tað var sjáldan, at menniskjuni vóru her so tíðliga, og forvitnið vann á mær. Eg mátti finna útav, hvar hon fór. So eg fylgdi aftan á henni. Tað var lætt. Sólin var enn ikki komin fram, og gentan var óvarin. Men tað var maðurin ikki. Hann sníkti seg aftan á henni, og eina løtu var eg bangin fyri, at hann vildi henni ilt. Men nei, hann leyp fram og kløkkaði hana. Tey flentu og stuttleikaðu sær, meðan tey spákaðu. Eg gavst at fylgja aftan á teimum, helt, at kærleiksfuglarnir skuldu fáa frið. Men tað var tá, meðan eg spákaði mær heim, at tað hendi. Eitt skríggj sang í fjøllunum. Eg helt til beins móti parinum.

Eg fann tey goymd aftan fyri ein stein. Maðurin lá oman á gentuni, sum skríggjaði og græt undir honum. Eg tók í skjúrtuna og skrykti mannin av gentuni. Hann fleyg afturav og rullaði omaneftir fjallinum. Tíanverri fór hann ikki útav.

Maðurin reistist skinklandi. Men tá hann lyfti høvdið upp, steðgaði hann. Eyguni í honum gjørdust stór, og muðurin fór upp og aftur sum á fiski.

,,RÝM!" ýldi eg. ,,SLEPP TÆR AVSTAÐ, ÁÐRENN EG SENDI TEG TIL HELJAR!"

Maðurin rann avstað, hvítur sum kavin. Eg vendi mær við og fór yvir til gentuna. Hon lá og ristist í grasinum við blóði millum beinini. Hon lætst ikki um vón, at eitt huldufólk stóð undir liðini á henni. Eg tók hana upp í favnin og bar hana heim til mín. Alla tíðina lá hon og græt inn móti bringuni hjá mær. Eg legði hana varisliga á songina og skonkti henni eitt glas av øli. Og froðuna blásti eg av sjálv. So yvirraskandi sum tað er, so vilja huldufólk ikki fortrølla hvønn Hanus og Janus, tey møta.

,,Hygg her, olmussudýrið, fá tær okkurt at drekka," teskaði eg, meðan eg kíndi henni um bakið. Eftir einari løtu setti hon seg upp og fekk sær. Vit sótu so har í friði, einastu ljóð vóru slurkini frá gentuni. Eg hevði aldrin sæð eitt menniskja so tætt við. Sjálvt um vit huldufólk kundu gerast ósjónlig, var ringt at nærkast nøkrum livandi, áðrenn tey kendu seg jagstrað. Men sprundið við mína lið rýmdi ikki, hon virkaði als ikki forstýrað av mínari hjáveru.

,,Eg eiti Eyð," segði gentan at enda. Hon hugdi ikki upp á meg, men stardi bert at krússinum. Røddin var syrgin og troytt.

,,Mýrisnýpa. Eg eiti Mýrisnýpa. Men eg verði sum oftast kallað Mýra."

,,Mýrisnýpa? Er tað eitt navn?"

,,Huldufólk verða oftast uppkallað eftir náttúruni. Líka sum menniskjuni plagdu at gera, áðrenn..."
Orðið brann á tunguni, men Eyð nikkaði, sum um hon skilti, hvat eg ætlaði at siga.
,,Vit hava enn onkur felagsnøvn sum Alda, Steinar, Sólja."
Eyð mutlaði okkurt samtykkjandi og sovnaði, sum hon sat. Eg reistist og læt hana úr skjúrtinum, sum eg síðan vaskaði. So bíðaði eg, til hon vaknaði, og fylgdi henni heim. Tað var liðið væl út á náttina, áðrenn Eyð fór inn um gáttina hjá foreldrunum. So fór eg heim.
Eg fylgdi ofta við í, hvat Eyð gjørdi eftir hendan dagin. Stardi at henni, meðan hon arbeiddi. Ansaði eftir, at hatta bartrogið ikki skuldi koma aftur. Vit tosaðu ikki, men Eyð læt ofta smør og ost liggja frammi við eitt opið vindeyga. Eg gav henni sum oftast blómur afturfyri.
Eg var har eisini til hennara dómadag. Mamman var komin inn ein morgun og var byrjað at rópa og skrála eftir henni. Hon hevði ikki bløtt í tveir mánaðir. Eyð græt og royndi at forklára støðuna, men mamman vildi einki hoyra. Eyð skuldi giftast við neyðtakara sínum. Hon helt á dyr, og eg aftan á henni. Hon rann og rann og steðgaði við steinin hjá mær.
Eg sýndi meg sjálva, og Eyð leyp í favnin á mær.
,,Eg giftist ikki við honum! Mýra, eg kann ikki, ikki hann. Eg vil ikki!"
,,Tað er í lagi," teskaði eg. ,,Eg havi eina ætlan. Stóla tú bara upp á meg."

Tað kvøldið, aftan á at Eyð var farin heim, fór eg til grannan hjá mær, Kálv, og leiddi hann við mær í songina. Og mín sann um eg ikki varð við barn ein mánað seinni. Kálvur var ikki maðurin, eg hevði hugsað mær at havt, men hann var vinarligur og stuttligur. Og vit tóku ikki lut í kirkjusiðum, so giftast skuldu vit ikki. Vit høvdu einans eitt barn saman.
Eg var ikki til brúdleypið hjá Eyð, slapp ikki í kirkjuna. Men eg sat uttan fyri vindeygað hjá henni so ofta, eg kundi, fylgdi henni, hvar hon fór. Kálvur skilti tað ikki, men hann tók ofta yvir fyri meg, tá eg varð ov móð. Tað er hart at vera við barn.
Og eftir átta mánaðir hevði Eyð átt. Og ein mánað seinni sat eisini eg við einum barni í favninum. So skjótt sum eg kundi, var eg farin út við barninum og komin aftur við hinum. Kálvur helt meg vera býtta. Har var ov nógvur munur á. Menniskjuni fóru at uppdaga tað. Men tað gjørdu tey aldrin. Bartrogið var ov býtt, og so leingi Eyð helt fast við, at hetta var hennara barn, kundi bygdarfólkið lítið gera. Og hon bar seg at, sum um hetta var hennara egna. Hon sat uppi yvir tí hvørja nátt og sang og lærdi tað siðir og lógir. Og trúnna tvingaði hon aldrin á barnið heldur.

Eftir sjey árum hendi tað endiliga. Maður Eyð vildi hava hana, hon segði nei, hann lurtaði ikki. Men tá kom barnið og leyp á mannin, og barnið sló og sló, inntil mann ikki kundi kenna hann aftur. Eyð var frí. Barnið kom heim til mín við líkinum, sum Kálvur tók sær av. Eingin fór eftir Eyð, øll tóku bara synd í henni, tí býtisbarn hennara hevði tikið lívið av manninum. Hasar djevulsins huldurnar, søgdu tey. Men tey vistu ikki. Tí menniskjuni vita aldrin, hví vit gera, sum vit gera.